90 SEKUND

LAGT TIL RÆTTIS: Inna Törnroos

# MARIANN KLEIN IVANSDÓTTIR

FAKTA **MARIANN**

**Navn:** Mariann Klein Ivansdóttir
**Aldur:** 27
**Bústaður:** Hoyvík
**Starv:** Hárfríðkanarkvinna og eigari Av Royal Hárfríðkan
**Sjeikur/makið:** Rúni Brimvík



MYND: JENS KRISTIAN VANG

# Eg vil altíð náa ov nógv

**Hvussu er lagið?**
Sera gott!

**Hvat sært tú teg sjálva sum – frisør ella forrætningskvinnu?**
Eg síggji meg mest sum frisør, tí tað er mítt stóra áhugamál.

**Hvat sigur tú við tey sum »skræða« seg um at tit hava flatskerm í hvørjum rúmi heima?**
Vit eru øll so ymisk og raðfesta ymiskt, og tað er tað sum ger lívi so spennandi.

## Hvar sært tú teg sjálva um 30 ár?
Still going strong!

**Hvat ger teg bangna?**
Gyldle Tårn í Tivoli, eg havi ein feril av hæddarskrekki!

## Hvør er Føroya besta frisør?
Tað má vera upp til hvønn einstakan at avgera. Eg strembi altíð eftir at gera mítt allarbesta

**Hvat er dýrasta plagg tú hevur keypt tær?**
Tað er ein jakki frá merkinum LOFTI

**Hvar keypir tú tíni klaðir?**
Uttanlanda – í Keypmannahavn, London og París. Í Føroyum er tað mest hjá Margerita og Sirri.

**Hvarhevði tú vilja verið ein fluga á vegginum?**
Kanska á eini kendari salong í útlondunum og fingi íblástur.

## Hvat hevur tú ein veikleika fyri?
Øllum, ið hevur okkurt við móta at gera. Til dømis hár, klæðir, skógvar, taskur og tilhoyr.

**Hvat ert tú glaðast yvir, við tíni egnu útsjónd?**
Hárið, tí tað er týdningarmesti parturin av útsjóndini. Tað eru eingi mørk fyri hvat man kann gera við tað, langt hár ein dag, stutt næsta og so framvegis.

**Hvør núlivandi føroyingur er ornduliga kulur?**
Rúni sjeikur mín og foreldur míni – eru rættuliga kulir persónar uppá ótrúliga nógvar mátar

**Hvørjir eru tínir størstu veikleikar?**
Eg vil altíð náa so nógvaferð meira enn tilber

## Hvat ger teg illa?
Óerligheit

**Hvat ger teg glaða?**
Tá míni nærmastu hava tað gott og eru glað.

**Hvat hevur lívi lært teg?**
At liva í nú'inum og gleðast yvir hvørja løtu.